

MYNDIR: TILVILDARLIGAR

orkunýtsluna. Grønur vøkstur minkar um strongd hjá íbúgvunum, og økir um trivnaðin, eisini tí flagið ljóðisolerar húsini væl. Gras og annar vøkstur minka eisini um dálkkandi evnini í luftini í stórbýnum, tí vøksturin sýgur evnini til sín og reinsar á tann hátt luftina. Ein annar týðandi fyrimunur er, at grasið upptekur stórar nøgdir av regnvatni og hetta minkar um trýstið á kloakskipanirnar, sum frammanundan eru undir stórum trýsti.

## Keypmannahavn á odda

Í dag hava umleið 30 bygningar í Keypmannahavn flagtekjur. Harímullum Nationalbankin, Posthúsið á Jagtvej og Hotel Palace við Ráðhúspláss. Men framyvir skulu allar nýggjar slættar tekjur, sum hella í mesta lagi 30 stig, hava grønan vøkstur. Roknað verður við, at umleið 5000 fermetrar av grønum verður á tekjunum árliga, um býarmenningin verður sum ætlað.

Nýggja átakið hjá Keypmannahavnar kommunu er tað mest ambitiøsa innan grønar tekjur í heiminum. Bert í Toronto í Canada eru tey á støði við Keypmannahavn.

Nýggja átakið verður lagt fram á einari heimskongres í London í heyst.



## Regnvatn

Vit vita, at veðurlagsbroytingarnar hava stórar broytingar við sær í veðurlagnum. Eitt nú verða stormarnir ógvusligari og meiri avfall kemur niður. Tí er tað eisini ein fyrimunur, um nógvar flagtekjur eru í býnum, tí flagið upptekur úti við 85 prosentum at regnvatninum teir fyrstu regntímarnar og hetta minkar um trýstið á kloakskipanina við 60 prosentum. Sostatt minkar vandin fyri vatnflóð, og kommunan sparir nógvan pening til viðlíkahald av kloakskipanini.

## Kølir býin niður

Stórbýir eru sum heild heitari enn smærri býir. Tað kemst av, at býurin hevur nógvar massivar flatur, sum umskapa sólarljósið til hita. Býurin verður sum ein grýta. Vantandi vøkstur darvar natúligu niðurkølingini, sum annars fer fram í náttúruni. Nógvi hitin økir um skaðiliga útlátið av ozon og um tørvin á orkuslúkandi køliskipanum ella air condition. Við at planta sum mest í býnum, minkar hitin og eftirspurningurin eftir kuldaskipanum. Kanningar í Toronto hava víst, at um 50 prosent av tekjunum eru flagtekjur, minkar hitin í býnum við 2°C, sum so aftur hevur við sær eina munandi minking í orkunýtsluni.

**Les meira á:**
greenroofs.org, igra-world.com
worldgreenroof.org